Sosialurin

# VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 12. mars 2004



**Tipsleygardagur: Frem-FC København, beinleiðis**
SAS-deildin, deildin fyri bestu liðini í Danmark er byrjað aftur. Topplið og botnlið møtast, og undan dystinum er liðið úr Keypmannahavn klárt favorittar. Spennandi verður at vita um nakar føroyingur verður á liðunum.
**Leygardagin kl. 15.00**



**Flógvakríggið 3:3**
Átta ára langa kríggið, sum Irak førdi móti Iran tømdi Irakiska statskassan í 1990. Hægri oljuprísur kundi hjálpt til at fáa landið aftur á føtur, so Saddam Hussein kravdi av grannalandinum Kuvait, at tað minkaði sína oljuframleiðslu fyri at trýsta prísin uppeftir. Kuvait segði nei, og tann 2. august 1990 gjørdi Irak innrás í landið.
**Týsdagin kl. 22.50**



**About a Boy**
Will, ein ríkur barnaleysur maður um tey 30, fær eitt gott hugskot. Hann ´uppfinnur` ein son fyri at fáa ein betri møguleika at skora einliga mammur. Skemtifilmur eftir skaldsøguni hjá Nick Hornby.
**Leygardagin kl. 19.00**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**